Jørn Astrup Hansen:

# Mugu hava minnilutastjórn í Føroyum

**–Við verandi meirilutastjórnarskipan verður einki rættiligt kjak í Føroyum, sigur Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka, sum var gestarøðari á landsfundi Javnaðarfloksins**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*



*Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka, var gestarøðari á landsfundi Javnaðarfloksins fríggjakvøldið.*
*Mynd: Eirikur Lindenskov.*

Við verandi siðvenju um meirilutastjórn í Føroyum, skapast einki veruligt kjak í Føroyum. Hetta heldur forstjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen. Javnaðarflokkurin bjóðaði honum at vera gestarøðari á landsfundi floksins, sum varð hildin um vikuskiftið í Havn.

Jørn Astrup Hansen hevði fingið frítt at tala um tað, hann hevði hug til á fundinum. Hann umrøddi sum væntað nógv Føroya Banka, sum hann tey seinastu tíggju árini hevur staðið á odda fyri – frá kreppuárunum til nú.

Jørn Astrup tók eisini onnur evni upp, sum hann kanska ikki hevur verið kendur fyri at røða um.

## Einki kjak

Forstjórin í Føroya Banka helt í talu sínari fyri javnaðarfólkum fyri, at vit í Føroyum tørva eina minnilutastjórn. Hetta segði hann útfrá tí sjónarmiði, at politiska kjakið í Føroyum – eftir hansara tykki – ikki er til.

–Kjakið í Føroyum hevur so mikið trong kor, at tað als ikki er møguligt at reisa nakað kjak. Ein minnilutastjórn hevði gjørt kjakið munandi betri. Við verandi skipan er talan um eitt demokratiskt undirskot, sigur Jørn Astrup Hansen.

Tað er greiða fatanin hjá Jørn Astrup Hansen, at verandi skipan at stjórna landinum ikki er gagnlig fyri kjakið sum er.

Í Føroyum er siðvenja at skipa meiralutastjórnir, t.e. samgongur, sum eiga meirilutan í løgtinginum. Í øðrum londum er hetta oftast óvanligt, og talan er í nógvum førum um minnilutastjórnir. Hesar stjórnir verða so noyddar at leita sær til aðrar flokkar eftir stuðli í hvørjum einstøkum máli fyri at fáa hesi ígjøgnum.

Í løtuni skipa Venstre og Konservativ eina minnilutastjórn í Danmark. Teir nýta sum oftast Dansk Folkeparti sum stuðulsflokk – eitt nú til fíggjarlógina. Á henda hátt við stuðulsflokkum er neyðugt við breiðum semjum um hvørt einstakt mál ella lógaruppskot.

Í Føroyum hava vit í tíðini við heimastýrinum altíð havt meirilutalandsstýri. Stýrisskipanin ásetur, at løgmaður skal hava ein meiriluta ímóti sær fyri at noyðast frá, og hetta sama er galdandi fyri lógaruppskot. Tískil kundi verandi samgonga hildið fram við sekstan tingmonnum. Hon kundi eisini hildið fram sum minnilutastjórn, men hetta krevur, at ein partur av andstøðuni "góðtekur" hetta.

Vanligt er, tá tosað verður minnilutastjórnir, at spurt verður áðrenn, hvønn flokk tey vilja hava at leiða stjórnarsamráðingar, t.e drótningarundan í Danmark og tingformansumfarið í Føroyum.

## Risiko

Jørn Astup Hansen nýtti eisini høvið til at tosa eitt sindur um støðuna hjá Føroya Banka.

–Tá árið í ár verður gjørt upp, hava at kalla goldið innskotið hjá landsstýrinum upp á 2,7 mia. aftur. Eg meti tað tó vera sera ivasamt, um Føroya Banki kann verða privatiseraður uttan nakað tap fyri landsstýrið, sigur Jørn Astrup Hansen.

Eg meti tað tó vera sera ivasamt, um Føroya Banki kann verða privatiseraður uttan nakað tap, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hetta segði hann í sambandi við, at eitt sjónarmið í Føroyum hevur verið, at Føroya Banki ikki skal privatiserast/einkiljast – seljast – fyrr enn hann hevur vunnið allar pengarnir innaftur, sum í sínari tíð vóru brúktir til at bjarga bankakervinum í Føroyum við rentum og renturs rentum.

Forstjórin í Føroya Banka vísti somuleiðis á, at tað - eftir hansara tykki – er týdningarmikið hjá føroyingum at lata fortíðina liggja í sambandi við bankan og heldur hyggja frameftir.

–Vit mugu eisini ansa eftir, at kjakið um leiklutin hjá bankanum ikki verður ov svart/hvítt, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hann helt eisini fyri, at føroysku politikararnir vístu mót í kreppuárunum. Eisini kundi hann ikki siga nakað ringt um eigaran av bankanum – Fíggingrunnin, sum landsstýrið eigur.

—Vit hava fingið arbeiðsrúm og hava einki at klaga um. Við verandi eigaviðurskiftum síggi eg tó, at tað er ein vandi fyri, at bankin upp á eitt tíðspunkt, tá vit minst rokna við tí, kann gerast politiseraður. Hesin vandin er vætnandi serliga stórur, um vit aftur renna okkum í kreppu ár í Føroyum, sigur Jørn Astrup Hansen.

Tað eru fyrimunir við at einkilja Føroya Banka, heldur Jørn Astrup. Hinvegin er einskiljing ikki nøkur ganda loysn uppá allar trupulleikararnar.

–Siga vit, at virðið á Føroya Banka er millum 1,5 og 2 milliardir, og tað bert kunnu vera føroyingar, sum hava møguleikan at keypa partabrøv, so kann tað lættliga enda við einum keyparamonopoli, og tað er íkki nøkur góð støða fyri Fíggingargrunni og fyri landsstýrið sum seljara, sigur Jørn Astrup Hansen.

## Svimja í pengum

Ikki óvæntað nevndi gestarøðarin eisini Elektron. Málið um nýggja Gjald-Skipanina hjá Elektron hevur veruliga tikið dik á seg í fjølmiðlunum seinastu tíðina, og eigararnir av Elektron eru ørkymlaðir um støðuna.

–Tá bankarnir skuldu leggjast saman í 1994 vórðu vit noyddir at velja ímillum tvær dátaskipanir. Vit vórðu í 1995 noyddir at velja Elektron – uttan at verða spurdir. Nú hendir júst tað sama: Vit verða ikki spurdir eftir. Tað er ikki lætt fyri okkum at skilja, sigur Jørn Astrup Hansen.

Áður hevur Jørn Astrup eisini úttalað alment, at ein greiður vandi er fyri, at føroyski búskapurin er á veg at gerast ovurupphitaður.

Í røðu sínari fyri javnaðarfólkum vísti hann eisini á, at vandi er enn á ferð í Føroyum.

–Samfelagið hevur ovurstórt gjaldføri, og rentan er í botni. Í dag er tað væntandi ov lætt,heldur enn ov trupult, at lána pengar, sígur altso Jørn Astrup Hansen.

# Peningastovnar stovnað felags málgagn

**Føroysku peningastovnarnir hava stovnað felag, sum skal geva stovnunum størri ávirkan, tá politiski myndugleikin ætlar at fremja broytingar**

PENINGASTOVNAR
*Heri á Rógvi*



*Føroysku peningastovnarnir hava kastað saman í eitt felag, sum betri skal umboða teirra sjónarmið yvirfyri myngudleikunum.*

Føroysku peningastovnarnir: Føroya Banki, Føroya Sparikassi, Norðoya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi, hava tann 7. november 2002 stovnað vinnugreinafelag. Felagið Peningastovnar.

–Stovnarnir eru av teirri fatan, at peningastovnsvinnuni hevur manglað eitt felags málgagn mótvegis almenninginum og – ikki minst – myndugleikunum. Tað er soleiðis vón stovnaranna, at løgting og landsstýrisumsiting fara at gera tað til siðvenju sína, at nýta felagið sum hoyringsmálgagn, tá lóggivið verður um viðurskifti, sum viðvíkja peningastovnum, skrivar felagið í tíðindaskrivi.

Jørn Astrup Hansen, nevndarformaður fyri felagið, sigur, at teir hava arbeitt við felagnum í eina tíð. Talan er um ein gamlan tanka. Hann avvísir, at felagið er stovnað í kjalarvørrinum av nógva rokinum um Elektron og Gjald-Skipanina. Hann heldur tó, at málið um Elektron er eitt høvið, har felagið kundið gjørt gagn.

Felagið hevur annars til endamáls at virka fyri góðum starvsviðurskiftum hjá føroyskum peningastovnum og røkja áhugamál limanna mótvegis landsstýrinum og øðrum almennum myndugleikum.

Nevnd felagssins er mannað við Jørn Astrup Hansen, Føroya Banka, Marneri Jacobsen, Føroya Sparikassa, Eyðfinni Reyðberg, Norðoya Sparikassa og Mikkjali Sørensen, Suðuroyar Sparikassa. Nevndin hevur skipað seg við Jørn Astrup Hansen sum formanni og Marneri Jacobsen sum næstformanni.



# Vil skipa nýggja samgongu

**– Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram at verða við til at skipa eina nýggja og arbeiðsføra samgongu. Hetta sigur flokkurin í landsfundarsamtykt, sum varð gjørd á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum, sum um vikuskiftið hevur verið á Læraraskúlanum í Havn**

LANDSFUNDARSAMTYKT
*Javnaðarflokkurin*



*– Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram at verða við til at skipa nýggja, arbeiðsføra samgongu, har dentur verður lagdur á at tryggja vælferð fólksins og endurreisa og styrkja*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Nú eitt hálvt ár er gingið, síðani samgonga varð skipað, staðfestir landsfundurin, at fremsta eyðkenni landsstýrisins er ráða- og atgerðaloysi. Hetta kemur til sjóndar við, at landsstýrið, vegna klandur og innanhýsis ósemjur, so at siga eingi mál hevur lagt fyri løgtingið higartil.

Høvuðsendamálið hjá sitandi samgongu tykist fyri ein og hvønn prís at vera at varðveita maktina, meðan politikkurin og harvið trupulleikarnir hjá samfelagnum og fólkinum, í besta føri, koma í aðru røð.

Besta dømið um ráða- og atgerðarloysi landsstýrisins er framlagda fíggjarlógaruppskotið, sum mest minnir um vánaliga kladdu, har útreiðslur fyri einar 200 mill. ikki eru tiknar við. Ruðuleikin í arbeiðinum við at fáa fíggjarlógina at hanga saman prógvar, at samgongan í ábyrgdarloysi tók alt ov rívan til, tá ríkisstuðulin varð skorin við 366 mió.kr.

Landsfundurin átalar, at á heilsuøkinum skulu vit framvegis liva við sparitiltøkum, sum enntá eru verri enn tá hin nívandi samfelagskreppan var í hæddini. Framvegis gerast bíðilistar bara longri, og deildir á sjúkrahúsunum verða eisini í 2003 stongdar vegna sparingar. Landsfundurin átalar somuleiðis, at hóast játtanin fyri sjúkraviðgerð uttanlands í hesum fíggjarári longu var uppi í september, so hava landsstýrið og samgongan framvegis eingi stig tikið til tess, at henda viðgerð kann halda fram. Tó fegnast landsfundurin um, at Javnaðarflokkurin megnaði at leggja so hart trýst á samgonguna og landsstýrið á tingi nú um dagarnar, soleiðis at ein loysn á hesum trupulleika nú er í ljósmála.

Hetta hálva árið og framlagda fíggjarlógaruppskotið bera boð um, at so leingi henda samgongan og hetta landsstýri sita, fara vit at liva við einum »sum best ber til« politikki, har ráðaog atgerðarloysi eru fremstu eyðkenni. Landsfundur Javnaðarfloksins krevur tí, at nýggj, arbeiðsfør samgonga verður skipað – ein samgonga, sum vil raðfesta politikkin og fólksins áhugamál fram um, bert at tvíhalda um maktina, og at sita við valdinum líkamikið hvussu víkir og vendir.

Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram at verða við til at skipa nýggja, arbeiðsføra samgongu, har dentur verður lagdur á at tryggja vælferð fólksins og endurreisa og styrkja rættartrygdina hjá borgarum landsins. Hetta skal verða grundað á ein skynsaman búskaparpolitikk og ein framrættaðan vinnupolitikk, har atlitið fyri burðardyggari menning og umhvørvisvernd er í hásæti.

Landsfundurin fegnast um, at Javnaðarflokkurin vil gera upp við tað ábyrgdarloysi og ta líkasælu, sum seinastu árini hevur valdað á umhvørvisøkinum. Javnaðarflokkurin vil seta ferð á arbeiðið við at fremja ein umhvørvispolitikk, sum lyftir okkum upp úr tí vanæruligu støðu, sum nú alment er staðfest.

Landsfundurin harmast um, at løgtingið feldi tey uppskot, sum Javnaðarflokkurin legði fram síðsta vetur at verja áhugamálini hjá brúkarunum og áleggur umboðum sínum á tingi áhaldandi at virka fyri, at brúkaravernd og rættindi verða ein sjálvfylgja eisini í Føroyum.

Landsfundurin ásannar, at tað er alstórur tørvur á at endurskoða og rationalisera ta almennu fyrisitingina, sum seinastu 4 til 5 árini høpisleyst er bólgnað.

Landsfundurin stuðlar tingmanningini í áhaldandi arbeiðinum fyri einum arbeiðsmarknaðarpolitikki, sum millum annað veitir løntakarunum greið setanarviðurskifti, trygd í starvinum og munagóðar arbeiðsmarknaðarútbúgvingar, eftirútbúgvingar og heilsugott arbeiðsumhvørvi.

Gongdin á altjóða partabrævamarknaðinum hevur kolldømt privatu fólkatryggingarskipanina hjá samgonguni. Tí er nú greiðari enn nakrantíð, at ein útbygging av samhaldsfasta eftirlønargrunninum er tann einasta trygga og gongda leiðin at veita øllum borgarum landsins nøktandi pensjónsviðurskifti.

Landsfundurin vísir á, at náttúrutilfeingið, fiskiloyvi og aliloyvi, eftir lógini eru ogn Føroya fólks. Tí harmast vit um, at enn er onki gjørt fyri at byrgja upp fyri, at einstaklingar og feløg kunnu spekulera í hesum ríkidømi sum fult umsetilig handilsvirði. Javnaðarflokkurin vil tí virka fyri eini nýggjari skipan, har tryggjað verður at fólksins ognar verða virdar og viðfarnar øllum fólkinum at gagni.



*Umboođ fyri Sosialistiskt Ungmannafelag*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Javnaðarflokkurin vísir eisini á, at náttúrutilfeingið, fiskiloyvi og aliloyvi, eftir lógini eru ogn Føroya fólks. – Tí harmast vit um, at enn er onki gjørt fyri at byrgja upp fyri, at einstaklingar og feløg kunnu spekulera í hesum ríkidømi sum fult umsetilig handilsvirði, sigur flokkurin í landsfundarsamtyktini. Fremst á myndini síggjast javnaðarfólk úr Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Hans Pauli Strøm nýggjur floksskrivari



**Landsfundurin hjá Javnaðarflokkinum um vikuskifti valdi Hans Paula Strøm, fyrrverandi løgtingsmann í Vestmanna, til nýggjan floksskrivara**

LANDSFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Seinastu 11 árini hevur Eyðólvur Dimon í Havn verið floksskrivari hjá Javnaðarflokkinum.

Hann stillaði ikki uppaftur á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum hesaferð, og í hansara stað varð Hans Pauli Strøm valdur.

Hans Pauli Strøm umboðaði Javnaðarflokkin á tingi frá 1998 til 2002 í Norðstreymoyar valdømi. Hann kom inn sum eykavaldur tingmaður í 1998. Við seinasta løgtingsval eydnaðist ikki Javnaðarflokkinum at fáa umdømisvaldan tingmann í Norðstreymoy, og fall tann eykavaldi hjá Javnaðarflokkinum hesaferð í Suðurstreymoy.

Umframt Hans Paula Strøm var formaðurin í SU, Kristoffur Gaardlykke eisini nývaldur í starvsnevndina, sum nú sær soleiðis út:

Jóannes Eidesgaard, formaður

Bergur Dam, næstformaður

Jancy Olsen, næstformaður

Hans Pauli Strøm, skrivari

Katrin Dahl Jakobsen

Vilhelm Johannesen

Kristiffur Gaardlykke